

## Frá skúlanæmingi til poppstjørnu

Fyri tveimum árum síðani var Ragnhild Dam ein vanligur næmingur í miðnámsskúla. Nú er hon poppstjøran í Føroyum. Ragnhild er ein av teimum fimm kvinnunum í popp-bólkinum Faroe5, og í Hvonn Live hesaferð greiðir hon frá, hvussu hon hevur upplivað ferðina frá skulabeinki til festivalpallar.

**hvonn ★★★★★ LIVE**

leygarkvøldið 20-22



## Turrlagdur provo

Hann prentar bløð við naknum føroyskum damum. Hann hevur drukkið so illa, at hann mátti leggja av, men nú er hann ein turr-lagdur provokatør. Jógvan á Høvdanum hevur upplivað mangt og hvat, og hann sigur okkum sína søgu um at ganga skít, at verða edrúur, og um at ferðast á markinum fyri, hvat nógvir føroyingar tola.



## Fullur lobbyistur í tinginum

Føroyingar eru ósamdir um, hvørt tað skal verða loyvt at keypa øl og vín í vanligum handlum. Men ein sannførdur maður við kenning fer í løgtingið at fáa politikararnar at broyta rúsdrekkalógina, so tað ber til at keypa øl og vín í vanligum handlum. Tað er skemtið hesaferð.



## Uni spælir live

Uni Arge hevur givið tvær sera vælumtóktar fløgur út seinnu árini, og fleiri av hasara sangum eru blivnir hitt. Uni Arge hugleiðir í sínum tekstum bæði um dagsins samfelag og um klassisk tema sum kærleika. Uni fer at framføra nakrar av sínum sangum live á Hvonn.

